LØGBITI NR. 3

# ARBEIÐSHÁTTUR LØGTINGSINS

LÓGARTÆNASTAN
2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 3**

# Arbeiðsháttur Løgtingsins

Løgtingið starvar eftir teim formligu reglum, sum ásettar eru í stýrisskipanarlógini og tingskipanini. Mál koma fyri Løgtingið í fimm formum:

1) Uppskot til løgtingslóg.
2) Uppskot til ríkislógartilmæli.
3) Uppskot til samtyktar.
4) Frágreiðingar, skrivligir ella munnligir ella ófráboðaðir fyrispurningar.
5) Misálit á løgmann ella landsstýrisfólk.

Aðrir viðgerðarformar eru ikki. Bert løgmaður, landsstýrisfólk ella løgtingsfólk kunnu byrja mál í Løgtinginum. Skrivar borgari ella felag Løgtinginum brævum eitthvørt, so verður hetta ikki tikið til viðgerðar uttan so, at løgtingsfólk tekur málið upp í einum av teim formum, sum omanfyri eru nevndir.

## 1. Uppskot til løgtingslógir

**Eftirkanning hjá umsiting Løgtingsins**

Áðrenn uppskot verða løgd fram í Løgtinginum, verða tey send Løgtingsins umsiting, har tey verða løgfrøðiliga og málsliga eftirkannað.

Endaliga orðað uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar skulu vera løgtingsformanninum í hendi í seinasti lagi 6. yrkadagin fyri framløgufundin. Tó skulu uppskot, sum verða løgd fram seinasta framløgudag eftir § 54 í tingskipanini verða løgtingsformanninum í hendi í seinasta lagi 12. yrkadagin frammanundan. Sí § 38 í tingskipanini.

**Tingviðgerð**

Uppskot til løgtingslóg skal vera fyri á fýra ymiskum tingfundum fyri at verða samtykt. Harumframt fær málið nevndarviðgerð í løgtingsnevnd.

**Framløga**

Tá mál verður lagt fyri tingið, boðar løgtingsformaðurin frá framløgu. Á hesum fundi verður málið ikki umrøtt og kann ei heldur beinast í nevnd.

**1. viðgerð**

Uppskot kann fáa 1. viðgerð 2. yrkadagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð verður uppskotið umrøtt í síni heild. Broytingaruppskot kann verða fráboðað og umrøtt.

**Nevndarviðgerð**
Eftir 1. viðgerð fáa málini vanliga nevndarviðgerð. Tað er løgtingsformaðurin, ið ger av, um mál skal beinast í nevnd, og hvørja nevnd tað skal í. Nevndin skrivar álit til tingið, og ein samd nevnd, meiriluti ella minniluti í nevndini kunnu seta fram broytingaruppskot. Vanliga fáa mál bara nevndarviðgerð millum 1. og 2. viðgerð. Tingið kann tó á øðrum viðgerðarstigum samtykkja at beina mál í nevnd. Undir nevndarviðgerðini viðgera nevndarlimirnir uppskotið gjøllari og fáa til vegar eyka upplýsingar frá almennum og privatum, og í flestu førum kallar nevndin eisini fólk inn á fund at fáa tey at siga sína hugsan um uppskotið.

**2. viðgerð**
2. viðgerð kann vera 3. yrkadagin eftir, at 1. viðgerð endaði, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram. Tingfólk kann skrivliga seta fram broytingaruppskot, men skal tað vera gjørt, áðrenn orðaskiftið við 2. viðgerð er byrjað. Nevndin, meiriluti ella minniluti í henni kann eisini skrivliga seta fram broytingaruppskot, eftir at 2. viðgerð er byrjað, men áðrenn orðaskiftið er endað. 2. viðgerð endar við atkvøðugreiðslu. Fellur uppskotið, steðgar viðgerðin her.

**3. viðgerð**
3. viðgerð kann vera 2. yrkadagin eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram. 4 tingfólk kunnu í felag skrivliga seta fram broytingaruppskot, og um málið er beint í nevnd við 2. ella 3. viðgerð, so kann meiriluti ella minniluti í nevndini skrivliga seta fram broytingaruppskot. Broytingaruppskot kann leggjast fram við 3. viðgerð, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verða broytingaruppskot og tær greinar, broytingaruppskotið viðvíkir, umrøddar fyrst og koma fyrst til atkvøðugreiðslu. Eftir hetta verður endalig viðgerð, tá tingið samtykkir ella fellir uppskotið.

Løgtingsformaðurin sendir samtykta uppskotið til løgmann at staðfesta og kunngera.

**Staðfesting og kunngerð**
Hóast Løgtingið endaliga hevur samtykt løgtingslógaruppskot, so er tað ikki bindandi fyri borgaran. Tað gerst tað ikki, fyrr enn løgmaður hevur staðfest uppskotið sum løgtingslóg og kunngjørt tað í Kunngerðablaðnum. Løgmaður hevur fullan rætt at nokta at staðfesta uppskotið, og tá verður so eingin løgtingslóg, men í flestu førum ger hann tað, tí annars fær hetta helst til avleiðing, at tingið noyðir hann frá sum løgmann.

## 1.1. Uppskot til ríkislógartilmæli

Uppskot til ríkislógartilmæli fáa á Løgtingi somu viðgerð sum uppskot til løgtingslógir. Einasti munur er, at samtykt Løgtingsins ikki verður kunngjørd alment, men harafturímóti fráboðað ríkismyndugleikunum av løgmanni. Tað samtykta uppskotið er ikki bindandi fyri borgaran, men sum orðið sigur, harafturímóti eitt óbindandi tilmæli til ríkismyndugleikarnar at gera eina lóg. Aloftast fylgja ríkismyndugleikarnir tilmælinum, og tá senda ríkismyndugleikarnir lógina til kunngering í Kunngerðablaðnum B.

## 1.2. Uppskot til samtyktar

Hesi mál verða viðgjørd sum uppskot til løgtingslógir. Tó enda hesi mál eftir atkvøðugreiðsluna við 2. viðgerð, og skulu ikki staðfestast og kunngerast av løgmanni. Løgtingsformaðurin sendir skrivliga fráboðan um samtyktina til løgmann. Uppskot til samtyktar eru ikki bindandi, hvørki fyri landsstýrið ella borgaran. Í onkrum førum krevst tó eftir stýrisskipanarlógini, at ein tingsamtykt skal til, fyri at landsstýrið kann gera eitthvørt, eitt nú gera týdningarmiklar sáttmálar við onnur lond.

## 1.3. Skrivligi, munnligir ella ófráboðaðir fyrispurningar

Eyðkenni fyri fyrispurningar er, at Løgtingið ger onga niðurstøðu undir hesum viðgerðarformum. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt; eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarformum kunnu løgtingsfólk fáa tær upplýsingar, tey hava fyri neyðini, frá løgmanni ella landsstýrisfólki, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat løgmaður ella landsstýrisfólkið ætlar.

## 1.4. Frágreiðingar

Løgmaður og landsstýrisfólk kunnu geva Løgtinginum frágreiðing um støðuna í máli, sum er teirra málsøki, og hvørjar ætlanir tey hava í hyggju at fremja hesum viðvíkjandi. Hesar frágreiðingar verða vanliga nevndar aðalorðaskifti. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt; eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Sí § 51 í tingskipanini. Ólavsøkufrágreiðing løgmans verður viðgjørd eftir somu reglum.

## 1.5. Misálit

Eftir stýrisskipanini er tað so, at løgmaður ella landsstýrisfólk eru óheft av Løgtinginum. Landsstýrisfólkini verða tilnevnd av løgmanni, og løgmaður verður tilnevndur av løgtingsformanninum, tó so, at ikki 17 tingfólk eru ímóti løgmansevni løgtingsformansins. Løgmaður og landsstýrisfólkini eru tó ikki óheftari enn so, at um so er, at 17 tingfólk eru ímóti einum av teimum, so mugu tey leggja frá sær.

Mál um misálit á løgmann ella landsstýrisfólk verða bert viðgjørd á einum tingfundi. Uppskot verður lagt fram um hetta av løgtingsfólki og verður alt fyri eitt sett á skránna at vera næsta mál á sama fundi. Tá umrøðan endar verður farið beinleiðis til endaliga atkvøðugreiðslu í málinum.

## 2. Samleiki (identitetur) á lógaruppskoti

Sambært stýrisskipanarlógini § 15, stk. 2 kann uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á Løgtingi.

Hendan reglan setir mørk fyri, hvørjar broytingar kunnu gerast í teimum uppskotum, sum eru løgd fram í Løgtinginum. Høvuðsreglan er, at broytingar ikki kunnu gerast, sum broyta samleikan í upprunaliga lógaruppskotinum. Mann kann siga, at tað í viðgerðini í

Løgtinginum er ein treyt, at tað skal vera tað sama uppskotið, sum fær tríggjar viðgerðir á tingi.

Í teimum førum tá lógaruppskot ikki er eitt uppskot til nýggja høvuðslóg, men eitt broytingaruppskot, er tað avmarkað, hvørjar broytingar kunnu gerast í uppskotinum undir viðgerðini í Løgtinginum. Ein broyting kann einans gerast í mun til broytingarlógina, sum er løgd fram í Løgtinginum og ikki í mun til alla høvuðslógina.

Tað er umsitingin í Løgtinginum, sum ger eina ítøkiliga meting av, um eitt broytingaruppskot í mun til sítt innihald og endamál má metast at vera so ólíkt tí upprunaliga lógaruppskotinum, at tað verður hildið ikki at vera ráðiligt, at tað ikki fær tríggjar viðgerðir í Løgtinginum. Umsitingin kann mæla til burturvísing, um samleiki ikki er.

Kann eitt broytingaruppskot ikki setast fram orsakað av kravinum um samleika, má uppskotið antin verða slept, ella kann tað verða sett fram sum eitt sjálvstøðugt lógaruppskot.

## 3. Støða landsstýrisins, tá uppskot er lagt fyri Løgtingið

Tað er vert at leggja sær í geyma, at tá eitt uppskot frá landsstýrinum er lagt fram á Løgtingi, fer tað út hondunum hjá landsstýrisfólkinum, og tað er eftir hetta Løgtingið, sum einsamalt ræður fyri viðgerðini av uppskotinum. Hendan viðgerðin fer fram í tingsalinum og í tingnevndunum.

Ynskir eitt landsstýrisfólk t.d. at gera broyting í tí lógaruppskotinum, sum tað hevur lagt fyri tingið, kann hetta verða gjørt við eini áheitan til ta tingnevndina, sum viðger uppskotið, um at seta fram broytingaruppskot við ynsktu broytingini. Landsstýrisfólkið kann ikki krevja, at tingnevndin skal seta fram broytingaruppskot. Tað er tingnevndin, sum avger, um hon vil eftirlíka áheitanini.

Landsstýrisfólkið kann eisini heita á eitt løgtingsfólk um at seta broytingaruppskotið fram.

## 4. At taka uppskot aftur, sum er framlagt í Løgtinginum

Landsstýrisfólkið kann taka uppskot aftur á øllum viðgerðarstigum. Men beint eftir at landsstýrisfólkið hevur boðað tinginum frá afturtøku, spyr løgtingsformaðurin, um annað løgtingsfólk, løgmaður ella landsstýrisfólk tekur upp aftur uppskotið. Um so er, verður uppskotið viðgjørt á tí stigi, sum tað er komið til. Sí § 55, stk. 3 í tingskipanini.
So hóast landsstýrið tekur eitt uppskot aftur, so kann tað vera, at t.d. eitt løgtingsfólk í andstøðuni tekur uppskotið uppaftur. Viðgerðin av uppskotinum heldur tá fram sum vanligt.